## VIÐMERKINGAR

# Kenna løgtingsfólk viðurskiftini í Suðuroy

**Finnleif Guttesen**



*Eftir at hava lurta eftir orðaskiftinum á tingið um miðnámsskúla í Suðuroy, so kemur tað týðuliga fram, at tingfólk skilja ikki viðurskiftini í Suðuroy.*

Fyri at fáa greiði á, hvat ein meiriluti av suðuroyingum ynskja, so er at taka formanninum í Tjóðveldisflokkinum uppá orði og lata Gallup spyrja suðuroyingar, hvar teir vilja hava ein miðnámsskúla at liggja, í Hovs dali ella í Vági, og tað skal bert spyrjast um hetta eina málið.

Ein kanning av Gallup, kann gerast uppá stutta tíð og tingfólk kunnu so við góðari samvitsku siga, at meirilutin hevur tala og vit gera sum ein meiriluti í Suðuroy ynskir.

# Johan Petersen og fjølmiðlaábyrgdarlógin

***Jógvan við Keldu***
*landsstýrismaður*

Sambært fyrispurningi frá Jóhan Petersen í Sosialinum og Dimmalætting, nær fjølmiðlaábyrgdarlógin verður løgd fyri løgtingið, skal eg enn einaferð svara.

Samgongan er samd um at yvirtaka fjølmiðlaábyrgdarlógina. Hon er klár



at leggja fyri løgtingið so skjótt yvirtøkulógin er sett í gildi á Ólavsøku.

# Hin føroyska "dieselmytan" er ein drepari!

***Jón Ellendersen***

Tað grettir ikki, fert tú til handils - sum hjá mær - í INN í Norðskála, ella hjá øðrum í Brotinum í Runavík, Bónus í Saltangará, ella tað er ditto í Klaksvík, SMS og Bónus í Havn o.sfr. so standa fleiri bilar við dieselmotori við motorinum í gongd. Útstoytini eru í *barnahædd* og eru sera, sera vandamiklir partiklar í dieselroyki, sum í Danmørk taka lívið av 1500 fólki hvørt ár. Tølini eru frá eini vísindaligari kanning.

Alt fleiri og fleiri harmast og gerast ørg inná hesar bilar, ella rættari, bilførarar sum eru so líkasælir við hvussu teir dálka náttúruna og lunguni á børnum og vaksnum. Og tað er at harmast um, ikki minst tá tað ferð eftir ferð er prógvað, at dieselroykurin ER sera vandamikil. Og summir førarar lata motorin ganga upp í hálvan og heilan tíma.

Spyrt tú bilførararnar hví teir lata bilin standa við motorinum gangandi, fært tú eitt heldur løgið svar: *"Tí, annars kann motorurin fáa skaða!"* ella: *"Tí tað er ikki gott fyri motorin bert at koyra stutt strekki, og tí noyðist eg at lata motorin ganga!"* Summir førarar eru sera, sera tekniskir og teppa eitt hvørt konufólk - í øllum føri við eini tekniskari svadu.

Men er hetta so? Er tað skaðiligt og oyðileggjandi fyri ein dieselmotor, sleppur hann ikki at standa og koyra uttanfyri hvønn einasta handil í Føroyum? Spyrt tú førararnar, so er svarið sjálvandi JA! Men, spyrt tú onkran, sum hevur gott skil fyri dieselmotorum, so er svarið NEI, tí tað er ein myta at tað skaðar motorin at koyra stytri strekki.

Einaferð, fyri mongum, mongum árum síðani var tað so! Tá var tað skaðiligt fyri dieselmotorin bert at koyra stutt strekki. Men motorarnir í dag tola, og tola væl at koyra stutt strekki uttan at skula standa í gongd meðan førarin fer inn í ein handil at keypa. Tað er yvirhøvur eingin umbering fyri at førarar av dieselbilum skulu seta í heilsuna hjá børnunum í vanda við at lata motorin ganga.

Men sum ikki einaferð, so eru myturnar sterkari enn veruleikin og tað er hvørki fyrstu ella seinastu ferð, at soleiðis er. Tíanverri eru tað ikki so heilt fáir bilsølumenn sum billa fólki inn, at tey noyðast at lata motorin ganga, koyra tey stutt strekki.

Hvussu í víðu verð skuldi tað so verið møguligt at havt dieselbilar í teimum býum, har tú noyðist at sløkkja motorin hvørja ferð tú støðgar við eina ljóskurv og har tað er strangliga bannað at lata motorin ganga í meiri enn 1 minutt - tó í summum førum, 3 minuttir. Høvdu føroyskir dieselførarar rætt, vórðu eingir dieselbilar seldur í hesum býum.

Tískil fari eg at heita á dieselførar um hereftir ikki at lata bilin standa og rúka, tí tá 1500 danir doyggja um árið, so sigur hetta so mikið sum, at einir 10 til 15 føroyingar eisini doyggja av teimum vandamiklu partiklunum, sum eru í dieselroykinum.

# Er Fólkaflokkurin í hugsjónarloysi?

**Abraham Mikladal**

Tað var bæði áhugavert og hugaligt at lesa skrivið hjá HUXA, har tey vísa tingmanning fólkafloksins vegin í politisku hugsjónunum.

Eg havi altíð havt sera ilt við at skilja at ein ultra liberalur flokkur, sum Fólkaflokkurin sigur seg vera — spyr bara Óla Breckmann, ferð aftaná ferð kann ganga undan á teimum mest grovu kraddara ferðum í landskassan fyri at veita reiðarum og vinnulívsfólki sosialhjálp. Her fossar millum teori og praksis.

Fólkaflokkurin hevur sjongra, nú í ein mansaldur,



at Tjóðveldisflokkurin er tann reina kommunisma. Men nú er so í øllum førum vent í holuni. Nú er tað Tjóðveldisflokkurin, ið er tann meira liberali á vinnuøkinum.

Fyri Fólkaflokkin er, eftir øllum at døma, bert talan um liberalan vinnupolitik, so leingi sum peningur er at vinna. Tá skulu Palleba og Marsanna ikki váða sær at krevja nakað sum helst. Men tá vinnuvirksemi gevur hall so skulu júst Palleba og Marsanna gjalda undirskoti!!

Tað at privat vinnuvirksemi fær slanguna í landskassan er til óbótaligan skaða, tað er so staðiliga prógva við gongdini í 80'unum fram til skrædli í 1992.

Ætlanir at lata almennan stuðul til vinnulívi kunnu grundgevast við nógvum (og tíðum góðum) grundgevingum, men trupulleikin er, at í tí løtu stuðulin er latin, gerð hann meir skaða enn gagn. So títt og knapt stuðuls krónurnar eru farnar at leka úr landskassanum, avskeplast alt vinnuvirksemi. Allar sunnar og góðar stýrimekanismur verða tiknar burtur. Avleiðingarnar er ógvusligar og oyðandi.

Tí eigur tingmanningin hjá Fólkaflokkinum at taka við læru av fólkafloksungdóminum í Huxa og atkvøða saman við Tjóðveldisflokkinum ímóti at stuðul verður latin rækiskipunum.

# Fólkaflokkurin-liberalur?

**HUXA-Fólkafloksungdómur**

**Fólkafloksungdómur følir tað sum sína skyldu, alment, at vísa veljarum og tingbólki Fólkafloksins á sína ónøgd við komandi ætlanunum hjá landsstýrinum at veita rækjuflotanum rakstrarstuðul áljóðandi 10 mió. kr,- í tvey ár. Hetta er ífylgi okkum ikki liberalur vinnulívspolitikkur.**

Tann liberala og monetaristika hugsanin er bygd á skilsemi tvs. tað, sum ikki vinnuliga ber seg, má falla. Hugsanin um felags gjald av undirskotsrakstri hjá vinnum, hoyrir gomlu keynesiansku búskaparpolitisku hugsanini til og ikki tí monetaristisku hugsanini, sum framstandandi røddir í Fólkaflokkinum siga flokkin at standa fyri.

Nýggi formaðurin í Búskaparráðnum, Johnny í Grótinum, ávaraði í Degi og Viku týskvøldið 19 apríl 2005 ímóti almennum stuðuli til vinnuna. Hann segði orsøkina til rakstrarstuðul at vera, at reiðarar á rækjuskipum ikki tora at seta kapital í vága, tí at útlitini fyri undirskoti er ov stórur. Hetta er, sum fleiri kunnugt, orsaka av høga oljuprísinum og stóra útboðnum av rækjum á ES-marknaðinum. Hví skulu pengarnir hjá skattgjaldarunum so setast í vága, tá ið reiðararnir ikki sjálvir tora at vága sín egna pening? Varð partafelagsskatturin ikki niðursettur frá 27% á 20% við tí fyri eyga at betra um konsolideringsmøguleikarnar hjá vinnuni?

Tá ið Fólkaflokkurin velur at fara í samgongu við Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum, má tað helst vera tí, at Fólkaflokkurin ber so í bandi, at tað er alneyðugt at føra ein sunnan, studningsfrían og liberalan rækjuvinnupolitikk í samgonguni, sum flokkurin sigur seg standa fyri.

Í løtuni eru vit vitni til, at núverandi samgonga við tí liberala Fólkaflokkinum, sum situr við trimum landsstýrismonnum, og við góðum útlitum fyri at føra liberalan rækjuvinnupolitikk, fer at stuðla landsstýrinum í ætlanini at veita rækjuflotanum stuðul frá skattgjaldarunum kring landið, og harvið slóða fyri, at feilirnir í áttatiárunum kunnu verða endurtiknir.

Tá ið ein vinna fær studning, fara kanska fleiri vinnur at banka uppá hurðarnar í Tinganesi. Hetta kann vera, í altjóða eygum, ein "falliterklæring" av tí føroyska samfelagnum og vinnulívi tess, at hvørja fer ein vinna kemur í kreppu, skal hon stuðlast.

Umheimurin ikki hevur gloymt orsøkirnar til kreppuna fyrst í nítiárunum, sum gjørdi, at uml. 7.000 fólk máttu rýma av landinum, tí vinnupolitikkurin í 80'árunum varð skeivt útinntur, har m.a. stuðul til vinnur, sum ikki kláraðu seg varð givin í sera víðfevnandi mun. Hví verður so ætlað at fara ígongd við at gera sama feilin umaftur, serliga tá **undirskotið** á fíggjarlógini fyri komandi ár, síðst vit frættu, sigst at fara at verða góðar **200 mió. kr,-?!?**

Fólkafloksungdómur vil mæla Fólkaflokkinum til at standa fastur um ein liberalan vinnulívspolitikk, sum merkir, at tær vinnur, ið ikki eru burðardyggar, mugu falla, tí EINGIN borgarligur flokkur kann hava so lítla sjálvsvirðing at lata stuðul og svíkja sítt støðufesti og landsins skattagjaldarar til gagns fyri nakrar reiðarar, sum ikki tora at vága sín pening í eina vinnu, sum teir sjálvir tykjast meta at vera farna fyri skeytið.

# Loysn upp á stríðið á LSH

**Dánjal P. Mariusarson**
*London, UK*

Ein loysn uppá fakliga stríðið á føðideildini á Landsjúkrahúsinum hevði verið at lagt stríðandi fakfeløgini saman.